Tórshavnar havn
Eystara Bryggja
Postrúm 103
110 Tórshavn

Tórshavn, hin 14. desember 2006
Málnr.: 6110-200600982-5
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: SP / Tlf.: 35 64 24

**Umhvørvisdeildin**

# Loyvi til aftursøkking

## 1. Loyvi og heimild

Sambært grein 2 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001 *um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum*, veitir Heilsufrøðiliga starvsstovan við hesum loyvi til at aftursøkkja tilfar, sum ætlanin er at taka upp av botni í sambandi við gerð av bryggju á Oyrareingjum.

Tilfarið kann aftursøkkjast millum Stong og Eystnes, á umleið 62° 02,7’ N og 06° 41,3’ W, sum víst á hjálagda korti.

## 2. Umsókn og málsviðgerð

Hin 13. november 2006 fekk Heilsufrøðiliga starvsstovan umsókn frá Tórshavnar havn um loyvi at aftursøkkja tilfar, sum skal takast upp í sambandi við dýping framman fyri bryggjuni, sum ætlanin er at gera á Oyrareingjum. Samlaða nøgdin, sum verður tikin upp er mett at vera uml. 150.000 $m^3$. Ætlanin er at nýta ein part av tilfarinum til uppfylling. Mett verður, at uml. helvtin av tilfarinum skal aftursøkkjast, t.e. uml. 75.000 $m^3$. Søkt verður um loyvi at søkkja tilfarið millum Stong og Eystnes.

Upprunaliga søkti Tórshavnar havn um, at tilfarið varð søkt á Kollafirði, og hin 29. apríl 2005 gav Heilsufrøðiliga starvsstovan loyvi til søkking av tilfarinum á Tangafirði, út fyri munnanum á Kollafirði, mál nr. 200400424-18.

*Felagið hummarabátar* kærdi loyvið til landsstýrismannin við tí grundgeving, at aftursøkkingarstaðið var av bestu hummaraleiðum, og at søkkingin fór at nerva hummaraveiðuna. Landsstýrismaðurin gav kæraranum viðhald, og sendi umsóknina aftur til Heilsufrøðiligu starvsstovuna til nýggja viðgerð.

Í skrivi frá Felagnum hummarabátar dagf. 3. oktober 2005 verður sagt, at teir mæla til, at tilfarið verður søkt í dýpinum millum Stong og Eystnes ella á einum øki grynri enn 20 metrar, við tað, at eingin hummaraveiða er á økjum grynri enn 20 metrar.

Hin 8. desember 2005 bað Tórshavnar havn um loyvi til at søkkja tilfarið innarlaga á Kollafirði, á einum dýpi millum uml. 15 og 20 metrar, men av tí, at bæði Landsverk og Fiskirannsóknarstovan mæltu frá hesum, metti Heilsufrøðiliga starvsstovan seg ikki kunna geva loyvi til hetta.

## 3. Ummæli

Sambært grein 5 í áðurnevndu kunngerð um aftursøkking, skulu umsóknir sendast til Fiskimálaráðið, Landsverk og avvarðandi kommunu til ummælis.

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 356 400**
Fax. **+298 356 401**
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

Báðar umsóknirnar um aftursøkking inni á Kollafirði hava verið til ummælis hjá Fiskimálaráðnum, Landsverki og Tórshavnar kommunu.

Tórshavnar kommuna mælti í báðum førum til, at umsóknin varð gingin á møti, men bæði Landsverk og Fiskirannsóknarstovan vóru ivasom um at søkkja tilfarið inni á firðinum, og mæltu til, at tilfarið varð søkt á streymasjógvi, t.d. millum Stong og Eystnes.

Tí hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan ikki mett tað vera neyðugt at senda umsóknina um loyvi at søkkja tilfarið millum Stong og Eystnes til ummælis.

## 4. Kanningar av botntilfarinum

Eftir umbøn frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni eru sýni tikin av botntilfarinum. Evnafrøðiligar kanningar eru gjørdar fyri tungmetalini Hg, Cd, Pb, Cu, Zn, umframt PAH og PCB. Eisini eru sýnini kannað fyri útsjónd og lukt.

Úrslitini av evnafrøðiligu kanningunum sýna, at innihaldið av dálkandi evnum er á einum lágum støði, og metir Heilsufrøðiliga starvsstovan tí, at tilfarið kann aftursøkkjast uttan vanda fyri dálking. Metingarnar eru m.a. bygdar á vegleiðingar hjá OSPAR[1] og SFT[2].

Botntilfarið er ljósur, fastur leirur. Einki lívrunnið er í tilfarinum og eingin luktur.

## 5. Avgerð

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur tikið avgerð um at loyva søkkingini millum Stong og Eystnes, uml. á knattstøðu 62° 02,7’ N og 06° 41,3’W, sum víst á hjálagda korti.

Avgerðin er grundað á tilmæli í málinum og egnar metingar. Eisini eru samrøður við Tórshavnar havn, Landsverk , Fiskirannsóknarstovuna og Felagið hummarabátar grundarlag undir avgerðini.

Avgerðin hevur verið til ummælis hjá Tórshavnar havn, Landsverki, Fiskimálaráðnum og Felagnum hummarabátar. Eingin teirra hevði viðmerkingar til avgerðina.

## 6. Treytir

Loyvið til aftursøkking er treytað av hesum ásetingum:

Aftursøkkingin kann ikki fara fram, fyrr enn kærufreistin sambært grein 9 er úti.

Mest møguligt av tilfarinum skal nýtast til uppfylling ella annað, so at minst møguligt verður aftursøkt.

Loyvið umfatar bara tilfar, sum er tikið upp av botni á økinum, sum er tilskilað í umsóknini.

Heilsufrøðiliga starvsstovan skal í góðari tíð hava boð um nær arbeiðið byrjar. Eisini skal boðast frá, tá ið arbeiðið er liðugt.

---

[1] OSPAR Commission for the Protection of the Marine Environment of the North-East Atlantic

[2] Statens Forurensningstilsyn í Noregi

Nøgdin, sum verður aftursøkt skal skrásetast saman við tíð, knattstøðu, dýpi og hvaðani tilfarið er tikið. Tá arbeiðið er liðugt, skal frágreiðing sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni um hvussu nógv er aftursøkt, nær arbeiðið varð gjørt o.s.fr.

## 7. Eftirlit

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlit við, at treytirnar í hesum loyvi verða hildnar. Tórshavnar havn skal lata allar upplýsingar, sum eru neyðugar, og skapa umstøður fyri, at Heilsufrøðiliga starvsstovan kann útinna eftirlitið.

## 8. Gjald

Tórshavnar havn skal, sambært kunngerð nr. 31 frá 8. mars 2001 *um gjøld eftir havumhvørvislógini*, rinda fyri ta viðgerð, Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur havt í sambandi við hetta loyvi. Somuleiðis skal gjaldast fyri møguligt eftirlit.

Gjaldið verður roknað við grundarlagi í tíðarnýtsluni og øðrum kostnaði í sambandi við viðgerðina.

## 9. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært grein 10 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, *um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum*, kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum sendir hana til landsstýrismannin saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, loyvið er almannakunngjørt. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Loyvið fær ikki gildi fyrr enn kærufreistin er úti.

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

Avrit: Landsverk, Postrúm 78, 110 Tórshavn
Fiskimálaráðið, Postrúm 347, 110 Tórshavn
Tórshavnar kommuna, Postrúm 32, 110 Tórshavn
Landslæknin, Postrúm 9, 110 Tórshavn

**AFTURSØKKINGARSTAÐ MILLUM STONG OG EYSTNES**

